# Lærlingur til INTERSPORT Tórshavn og Glyvrum

**Søkt verður eftir lærlingum til Intersport í Tórshavn og Glyvrum**

Starvið fevnir um alt vanligt handilsarbeiði innan sølu av ítróttarútgerð. So ert tú ein m/k, sum hevur áhuga innan hetta økið, kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð hjá okkum

Thomas Dam Ítróttur er partur av Intersport- og Sport Direct samtakinum og hava vit 3 ítróttarhandlar í Tórshavn, Glyvrum og Klaksvík.

So ert tú ein fryntlig/ ur persónur við áræði og ikki ert bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur ert tú vælkomin at søkja hetta læupláss. Lærutíðin er 2 ár við HH prógvi og 3 ár við FHS prógvi.

Umsóknir við prógvum og viðmælum verða at senda til:

**P/F THOMAS DAM**
ÍTRÓTTUR · Boks 268
FO-100 Tórshavn
ÍTRÓTTUR á Glyvrum · Glyvrarvegur
FO-625 Glyvrar

**www.bkv.fo**

## Vit søkja eftir hjálparfólki

Roknskaparstovan **BKV.FO** søkir við hesum eftir bókhaldara hálva tíð at byrja sum skjótast. Vit hava nógv at gera. Hava skrivstovu í Havn og á Sandi

**BKV**
Jákup Dahlsgøta 2 · Tórshavn
Tlf. 310 090 • Fax 312 091
e-mail: bkv@bkv.fo
*Kring Føroyar...*

## Feriuavloysari til IRF

**IRF** søkir við hesum eftir feriuavloysara sum bilførari til nakrar av bilunum hjá IRF, at byrja beinanvegin.

Starvið er lønt sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til IRF á tlf. 414243 ella 234216, Jógvan Júst Olsen

**IRF**
Postboks 39
520 Leirvík

IRF
www.irf.fo

FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ

# STARV
## SUM HAVNASTJÓRI VIÐ FUGLAFJARÐAR HAVN

Starvið sum havnastjóri við Fuglafjarðar havn verður hervið lýst leyst at seta tann 01. oktober 2008 ella so skjótt sum til ber eftir hetta.

**Starvið:**
Tú kemur at hava dagligu leiðsluna av Fuglafjarðar havn, somuleiðis sum tú eisini í starvinum kemur at átaka tær uppgávur við at marknaðarføra havnina í tøttum samstarvi við havnanevndina og býráðsleiðsluna.

Førleikakrøv: Útbúgving sum skipsførari ella aðra viðkomandi hægri útbúgving og førleika í enskum máli bæði í talu og skrift, somuleiðis sum tú skalt duga at orða teg væl bæði munnliga og skrivliga, hava teldukunnleika og kunnleika til nýmótans leiðslamboð.

Haraftrat skal tú eisini hava hollar leiðsluførleikar frá almennari ella privatari vinnu, og ávísar royndir innan sjóvinnu.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har tú sum leiðari fær møguleika fyri at menna havnina.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag, somuleiðis verður skrivligur sáttmáli gjørdur partanna millum um arbeiðstreytir vm.

**Starvstreytir:**
Umsøkjarar við royndum innan sjóvinnu hava fyrimun.

Royndartíðin verður sambært avvarðandi sáttmála.

**Hevur tú áhuga**
so ert tú vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum CV og viðmælum til Fuglafjarðar býráð, Postboks 30, 530 Fuglafjørður, og skal henda verða ráðnum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 15. august 2008 kl. 15.00.

**Fleiri upplýsningar**
fáast við at venda sær til Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra á telefon 737777 ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 737702.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum umsóknirnar ella onga at taka.

*Fuglafjørður 19. juni 2008*

***Fuglafjarðar býráð***

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# TILBOÐ UPP Á SKÚLABARNAFLUTNING

Fuglafjarðar kommuna lýsir hervið skúlabarnakoyringina Hellurnar-Oyndarfjørð skúlaárið 2008-2009 leysa frá 18. august 2008 at rokna.

Talan er um flutning av einum næmingi av Hellunum til skúlan í Oyndarfirði og flutningur aftur til Hellurnar eftir skúlatíð.

Tað verður kravt, at tann ella tey, ið átaka sær skúlabarnakoyringina, lúka krøv um, at akfarið, ið nýtt verður, skal verða góðkent og skrásett til vinnuligan fólkaflutning, herundir tryggjað til vinnuligan fólkaflutning, og at førarin hevur galdandi koyrikort til vinnuligan fólkaflutning til persónbil ávikavist buss.

Møgulig tilboð, ið skulu verða skrivlig, skulu verða Fuglafjarðar kommunu, Postboks 30, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 18. juli 2008 kl. 15.00.

Nærri upplýsningar um flutningsdagar og tíðir kunnu fáast frá Halli Ellingsgaard, skúlaleiðara við Oyndarfjarðar skúla á telefon 252264.

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomin tilboð ella einki at taka.

*Fuglafjørður, tann 23. juni 2008*

**Fuglafjarðar kommuna**

## KUNNGERÐ

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum verður gjørt kunnugt, at bygdaráðið hevur á fundi 20. juni 2008 samtykt at broyta alla byggisamtyktina (broyta skrivligu viðtøkurnar og ásetingar) fyri kommununa, og verða broytingar lagdar fram til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 1. juli 2008 til og við 6. oktober 2008.

Broytingarnar í byggisamtyktini eru viðvíkjandi greinum (§) í:

Innihald:
Kap.I., Kap.II., Kap.III., Kap.IV., Kap.V., Kap.VI., Kap.VII.

Byggisamtyktin fyri Kvívíkar kommunu:
Kap.I., Kap.II., Kap.III., Kap.IV., Kap.V., Kap.VI., Kap.VII.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at lata kommununi skrivliga í seinasta lagi 8. oktober 2008.

Kvívík tann 30. juni 2008

**KVÍVÍKAR KOMMUNA**
**Víkarvegur 5 • FO-340 Kvívík**
**Tlf. 421294**